# Volvo skifta stíl




**Um eini tvey ár kemur nýggjur Volvo S60 á marknaðin. S60 var fyrsti bilurin við nýggja Volvo stílinum, sum allar sedan útgávurnar hjá Volvo hava í dag. Nýggi S60 fær ein heilt annan og meira ágangandi stíl**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan Volvo S60 kom á marknaðin, fyri umleið sjey árum síðan, hava allir hinir Volvo persónbilarnir fingið líknandi útsjónd. Nú sær tað út til, at tá nýggjur S60 kemur á marknaðin um eini tvey ár, verður tað við heilt øðrum stíli, sum líkist meira SUV útgávunum hjá Volvo, XC90 og XC60.

S60 er miðalstøddin í sedan røðini hjá Volvo. Volvo XC60 og nýggi S60 verða fyrstu bilarnar, sum eru teknaðir av designstjóranum hjá Volvo, Steve Martin.

Sum skilst kemur nýggi S60 á marknaðin síðst í 2009 ella fyrst í 2010.

*Bilteknarin De Lusi gevur her eitt realistiskt boð upp á, hvussu nýggi Volvo S60 kemur at síggja út*

# Vectra skiftir navn í 2008

**Núverandi Opel Vectra verður avloystur av einum heilt nýggjum bili við nýggjum navni næsta ár. Bilurin kemur eftir ætlan á marknaðin á vári 2008**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Tá ein nýggjur avloysari kemur fyri Opel Vectra í 2008, verður tað undir einum øðrum nýggjum navni. Núverandi Vectra er triðja generatión, síðan Vectra avloysti Opel Ascona í sínari tíð.

Navnaskiftið verður eisini fyri at undirstrika, at talan verður um ein heilt nýggjan stíl hja Opel.

Fleiri tekningar og konseptbilar hava verið at sæð í sambandi við avloysarin fyri Vectra, men nýggjastu myndirnar avdúka hvussu vit kunnu rokna við at bilurin kemur at síggja út.

Bilurin kemur eftir ætlan á marknaðin á vári 2008, men nýggja navnið verður ikki avdúkað enn.

*Hendan myndin avdúkar, hvussu vit kunnu rokna við, at avloysarin fyri Opel Vectra kemur at síggja út*